# TAÐ HENDIR ...

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein



## PLANET AWARDS

Stóra Planet Awards tiltakið verður hildið sunnukvøldið, og tá verða tey fremstu í føroyksum tónleiki hetta árið heiðrað. Seks heiðurslønir verða lætnar til tey bestu í ár, umframt at eitt serligt herðaklapp verður latið onkrum, sum hevur gjørt nakað serligt fyri føroyskan tónleik. Planet Awards verður hildið á Rex, og Rás2 sendir beinleiðis frá tiltakinum.

**PLANET AWARDS**
Sunnukvøldið 27/12 kl. 20.00
Rás2 sendir beinleiðis



## PRÁT VIÐ GIBB-BEIGGJAN

Í summar var Robin Gibb á palli í Føroyum. Ummælini av hansara framførslu vóru ikki tey bestu, men eingin kann nokta fyri, at hann og beiggjarnir teljast millum størstu poppstjørnur í heiminum seinastu 40 árini. Við bólkkinum Bee Gees náddu teir víða við tónleikinum. Gunnar Nolsøe hevur gjørt samrøðu við Robin Gibb, og samrøðan er partur av einari vangamynd, sum Útvarpið sendur í dag.

**VANGAMYND – ROBIN GIBB**
Útvarpið
mikudagin 23/11 kl. 17.03



## DREPUR POOLE AFTUR?

Ungi Eric Poole hevur sitið dóm fyri eitt tvídráp, men fer hann at drepa aftur. Hann hevur eginleikar, sum seriudrápsmenn hava, og tí er løgreglumaðurin Christofuoro ikki í iva í, at Poole fer at gera um seg aftur. Hann velir tí at hava eina serliga eygleðing við Poole, men hann er ikki tann einasti...

**TENDERSNESS**
dvd



## LEGENDAN Á PALLI

Tað var ein stór løta fyri føroyskar country-fjepparar, tá ið Charley Pride spældi á føroysk-um palli. Sangarin, sum nógvir føroyingar hava havt eitt serligt forhold til, stóð nú livandi frammanfyri teir og sang. Sjónvarið tók konsertina upp, og hon verður send annað jólakvøld.

**CHARLEY PRIDE**
konsert í Føroyum
Sjónvarpið, annað jólakvøld 26/12 kl. 21.20



## SNARSKEIÐ Í STAVSETING

Hevur trupult við at seta ð og komma á rætta stað, so kanst tú kanska tíðina millum jólanna til eitt snarkskeið í stavseting. Í hesari bókini verða grundleggjandi spurningar í sambandi við stavseting viðgjørdir.

**JONHARD MIKKELSEN**
Snarskeið í stavseting
Sprotin



## BRANDUR BJÓÐAR NÝTT

Brandur Enni hevur tvær útgávukonsertir millum jóla og nýggjárs. Nýggja fløgan hjá Brandi, Sometimes Truth Needs A Lie, kemur út í Norðurlondum í januar mánaði, men hon fæst longu nú til keyps í Føroyum, og Brandur fer at hava nakrar útgávukonsertir í tí sambandi

**BRANDUR ENNI**
Útgávukonsertir

Mentanarhúsið í Fuglafirði týsdagin 29/12 kl. 19.30
Seglhúsloftið á Tvøroyri mikukvøldið 30/12 kl. 19.30




## SJÓMENN Á VØLLIN

Millum jóla og nýggjárs er innandurakapping í fótbólti fyri sjómenn. Kappingin verður aftur í ár hildin í KÍ høllini í Klaksvík, og tá kunnu sjómenn lata línu og trol liggja eina løtu og hugsa um at spæla fótbólt. Kappingin plagar at hava góða undirtøku og verða gott undirhald.

**INNANDURAKAPPING FYRI SJÓMENN**
KÍ høllin í Klaksvík
mánadagin 28/12 kl. 10.00